# Fundarbók hjá Vestmanna Bygdarráð.
# Bygdarráðsfundur tann 30. apríl 2014, kl. $19^{00}$.

**Bygdarráðslimir á fundi:** Pauli T. Petersen, Karl A. Olsen, Hilbert Elisson, Durita á Heygum, Malan Stórá, Herit Magnussen og John Zachariassen
**Skrivari:** Maud Poulsen

---

Borgarstjórin kunnaði um, at síðani skráin varð løgd, er eitt mál komin avtrat at viðgera fyri opnari hurð:

- Tilmæli um samstarvsøki um eldraøkið.

Borgarstjórin heitti á bygdarráðið um loyvi at seta málið á skránna sum mál 81 at viðgera fyri opnari hurð. Eitt samt bygdarráð gekk áheitanini á møti.

Til viðgerðar fyri **opnari hurð**:

**Mál 77**
Formlig umsókn frá Teknisku deild hjá Vestmanna Kommunu um byggiloyvi til læknamiðstøð í Garðabøi.

Søkt verður um byggiloyvi eftir tekningum frá Palla Gregoriussen, arkitekti, merktar 1 til 10.

Leggið til merkis, at tekningarnar eru uttan kjallara, sum Bygdarráðið annars hevur samtykt at gera undir bygningin. Hesar eru ávegis, og vónandi vera tær tøkar til bygdarráðsfundin. Hesar koma tó bert at vísa broyttu síðumyndirnar, tí at enn er ikki tikin støða til, hvat skal vera í kjallaranum.

**Viðv. 77**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 78**
Bygging av nýggjum felagshúsi hjá Kommunufelagnum.
J.nr. 82.06.00-G01-1-14

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. apríl 2014 málið um bygging av nýggjum felagshúsi hjá Kommunufelagnum.

Nevndin mælir til at taka undir við at byggja nýtt felagshús til Kommunufelagið, staðsett í Tórshavn.

**Viðv. 78**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 79**
Fígging av kostnaðinum av nýggjum felagshúsi hjá Kommunufelagnum.
J.nr. 82.06.00-G01-1-14

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. apríl 2014 málið um fígging av kostnaðinum av nýggjum felagshúsi hjá Kommunufelagnum.

Nevndin mælir til at fíggja partin hjá Vestmanna Kommunu yvir fíggjarárini 2014 og 2015. Gjaldið fyri 2014 verður tann afturbering, ið Vestmanna Kommuna fær frá niðurlagda Føroya Kommunufelag. Restin verður fíggjað á fíggjarætlanini fyri Vestmanna Kommunu fyri 2015.

**Viðv. 79**
Pauli T. Petersen skjeyt upp at broyta tilmælið soleiðis at gjaldið fyri 2014 verður tann afturbering, ið Vestmanna Kommuna fær frá niðurlagda Føroya Kommunufelag. Restin verður fíggjað á fíggjarætlanunum fyri Vestmanna Kommunu fyri ávikavist 2015 og 2016.

Atkvøtt varð fyrst um Tilmælið varð einmælt samtykt.

**Mál 80**
Umsókn frá Bátastevnunevndini um stuðul til Bátastevnuna 2014.
J.nr. 20.15.00-Ø40-1-13

Fíggjarnevndin viðgjørdi á fundi tann 23. apríl 2014 umsókn frá Bátastevnunevndini um stuðul til Bátastevnuna 2014 á kr. 25.000.

Nevndin mælir til ikki at ganga umsóknini á møti.

**Viðv. 80**
Tilmælið varð samtykt við seks atkvøðum fyri og einari ímóti.
Herit Magnussen atkvøddi ímóti.

**Mál 81**
Tilmæli frá Paula T. Petersen, borgarstjóra, um skipan av samstarvsøki um eldraøkið.

Vísandi til §4 í løgtingslóg nr. 20 frá 7. apríl 2014 um kommunalt samstarv um heimatænstatu, eldrarøkt v.m. skulu kommunurnar áðrenn 1. mai 2014 hava skipað seg í kommunal samstarvsøki, ið hava til endamáls at umsita heimatænastu, eldrarøkt v.m. í avvarðandi kommunum.

Undirritaði mælir bygdarráðnum til at taka undir við, at Sunda, Eiðis, Kvívíkar og Vestmanna kommunur skipa seg sum samstarvsøki um eldraøkið.

**Viðv. 81**
Tilmælið varð einmælt samtykt.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 20.30

Sign.:

Pauli T. Petersen Karl A. Olsen Hilbert Elisson

Malan Stórá Durita á Heygum Herit Magnussen John Zachariassen